LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

BMW 525 TDS
Ein motorur til BMW 525 TDS til sølu. Hevur koyrt 250.000 km. Aðrir lutir til BMW E34 seriuna eisini til sølu.
216409

VW PASSAT ST. CAR
VW Passat stationcar, árg 1987, km 180.000, til solu fyri 8.000,- kr. Biligur bilur, id lættliga koyrir 1–2 ár afturat og startar hvørja ferð.
Tlf. 744821

KIA PRIDA 13 GLXI
Árg. 98, km. 47.500, sportfelgur vetrardekk v/píkum + eyka felgur v/skálum. Kr. 45.000.
Tlf. 314246 ella 226585

BRÚKTUR VIÐFESTIVOGNUR
Til bil ynskist. Hevur tú ein slíkan tú ætlar at sleppa av við, so ring
Tlf. 224751

BÍLIGUR DIESEL
Nissan Almera 2.0 D, árg. 96, koyrt 128.000 km, biliga til sølu.
Tlf. 212555

DIESELBILUR TIL SØLU
Ein VW Golf III 1.9 CL, 3 hurðar. Bilurin er nýsýnaður og selist v/ alu-felgum og cd-spælara. Sera økonomiskur.
Tlf. 222324

TIL SØLU
Mazda 626, árg. 89, sera góður til eykalutir.
Tlf. 222126

MAZDA 626
árg. 89, nýsýnaður, í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 222126

EYKALUTIR
Til Toyota Hiace, árg. 85-95 og Hilux, árg. 87, til sølu.
Tlf. 227922

TIL SØLU
Mazda 323, árg. 86 selist sum eykalutir, koyrir væl. Ringjast kann eftir kl. 13.00 á
Tlf. 318554 ella 263046

EYKALUTIR TIL RENAULT
Megane, 1.4, 5 hurðar, 1 eykahjól, nýtt. Ein forrútur, ein baklúka við rúti. Ein vinstra forskermur. Ein vinstra bakhurð. Ein vinstra forhurð. Tvær baklyktir bíliga til sølu.
Tlf. 583388/213388

GOLF 1.6 TURBO DIESEL
í góðum standi til sølu. Skift ymiskt s.s. kamreim. Hevur koyrt 130.000 og er frá 86. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 253402 eftir kl. 15.30

HJÆLP! BIL SØGES
st. car eller større, skal ikke være synet, må gerne have plader, har du en stående du gerne vil af med, ring til mig.
Tlf. 270408

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12^{00}, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

TIL SØLU
Renault Megané 1.6 coupé, árg. 96, myrkagrønur, nýsýnaður.
Tlf. 583388/580474

Arbeiði

EG ÁTAKI MÆR AT
hava bókhaldið fyri smærri virkir og handlar. Eg nýti bókhaldsskipanina Navission. Ársroknskapur kann eisini gerast.
Tlf. 250205

SØKT VERÐUR EFTIR FÓLKI
m/k at røkja eitt fjós við mjólkineytum frá 1. apríl 04. Kann lærast. Fjósið er á høvuðsstaðarleiðini. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1793

AU-PAIR TIL ÍSLAND
Hjún í Keflavík við 2 synum, 3 og 5 ár, søkja gentu, skal vera 18 ár ella eldri, má hava koyrikort. Nærri upplýsingar fáast á
tlf. 373976

TILKOMIN KVINNA
søkir vaskiarbeiði, alt hevur áhuga – helst stovnar, virki, handil ella privat.
Tlf. 441707

ROYNDUR OG RØKIN
útróðrarmaður søkist til várfiskiskap.
Tlf. 320470

VASKIARBEIÐI SØKIST
Eg eri ein 23 ára gomul genta, ið søki vaskiarbeiði í Havn fyrrapart. Ring
Tlf. 220859

Barnaansing

DAGRØKT
Dagrøkt søkist til 10 mánaða gamla drong í Havn, sum hevur brúk fyri ansing av og á.
282528

BARNAANSING YNSKIST
Til 8 mán. gamla gentu. Løn og arbeiðstið kunna vit tosa um.
Tlf. 217530

Barnaútgerð

KOYRISTÓLUR
Við lambaskinni selist fyri 1.200 kr.
Tlf. 322850

SVARTUR OG GRÁUR BRIO BARNAVOGNUR
Til sølu fyri 3.000 kr. Bert brúktur til eitt barn. Er keyptur í 2003. Nýprísur 5.500 kr.
Tlf. 314394 ella 228337

TIL SØLU
Bilbarnastólur við galesju 0-9 mán. til sølu fyri 550 kr. Nýprísur 1.195,- kr.
Tlf. 319119 ella 214119

TIL SØLU
Hvít rimasong við madrassu, dýnu og kodda bíliga til sølu.
Tlf. 447340

YNSKIST
Góður babyalarmur og »snugliposi« ynskist til keyps.
Tlf. 255200

TIL SØLU
Ferðasong til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 373116

BLÁUR OG HVÍTUR
koyristólur av merkinum Simo Bertini í góðum standi og dupultur klappvognur við kalesju til sølu.
Tlf. 424697

TVEIR KOYRISTÓLAR
til sølu. Ein bláur koyristólur v/ galesju og ein grønur v/ galesju bíliga til sølu.
Tlf. 322193 ella 257971

YMISK SMÁBARNAÚTGERÐ
so sum koyristólur, bíliga til sølu.
Tlf. 318032

BARNAKOYRISTÓLUR
sum nýggjur, til sølu.
Tlf. 222682

KOYRISTÓLUR
Brio koyristólur til sølu fyri 900,00. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 319223

VØGGA YNSKIST TIL KEYPS
Vøgga ynskist til keyps.
Tlf. 322120 ella 522120

PUSLIBORÐ
Puslborð ynskist til keyps
Tlf. 322120 ella 522120

VEGNA FEILKEYP
Er ein koyristólur til sølu. Nýprísur 1.800 kr., kann fara fyri minni.
Tlf. 281348

Bátaútgerð

BÁTUR TIL SØLU
Ein Grimsøy 27 føtur við 48-60 HK motori. Klárur til fiskiskap. Báturin hevur fiskiloyvi. Øll vanlig útgerð.
Tlf. 447286 ella 269369

STIGFJORD 28 FÓT
Báturin hevur fiskiloyvi. Er klárur til fiskiskap við línuspæli, heilautomatiskum snellum og bjargingarbáti. Allari vanligari nautiskari útgerð s.s. radara, litekkoloddi, sjálvstýrara, VHF o.a.
Tlf. 321666 ella 213800

BÁTAVOGNUR
ynskist til keyps til Hvalvíks jollu br. 1.8 m. l. 5,0 m.
Tlf. 317905 ella 211631

YNSKIST TIL KEYPS
8-10 mannafar í góðum standi við fiskiloyvi, ynskist til keyps.
Tlf. 371633 ella 281633

NAKRIR SVØVLASTAMPAR
ynskjast til keyps, 4-5,5 mm.
Tlf. 221866

2 HEILAUTOMATISKAR
oljutrýst Vágasnellur 12 V til sølu fyri 5.000,- kr. stk.
Tlf. 581582

VÁGASNELLUR
6 stk. hálvautomatiskar oljutrýst vágasnellur, v/ línuspæli, tanga og pumpu, við 12 volt magnet kobling.
Tlf. 257080/361180

RASARABÁTUR TIL SØLU
5,5 m. langur og 2,5 m. br. v/ vogni og nýggjum motori. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 373557/220216

SNELLUR TIL SØLU
2 Belitronic BJ 5 snellur til sølu fyri 1.000,-
Tlf. 317078 eftir kl. 18

TIL SØLU
Eitt snøgt og vælbygt 8 mannafar í góðum standi, báturin er frambygdur við stórum góðum kaldbakshúsi. Hevur alla vanliga útgerð, verður seldur uttan motor fyri 25.000 kr.
Tlf. 321225 ella 211232

Bingo

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 22. mars kl. 19. Nógvir góðir vinningar. Millum annað turt kjøt.
Høvuðsvinningur á lutaseðli: Apex-flogferðaseðil.
Astma- og Allergifelagið

FRÁ MISSIÓNSHÚSINUM Í HVALBA
Lyklarnir til skutaran sum skuldu roynast 13. mars er útsett til 17. apríl og 24. apríl báðar dagar frá kl. 14–16 í Missiónshúsinum í Hvalba.
Missiónshúsið í Hvalba

BINGO
Verður á Svangaskarði mikudagin 17. mars kl. 19.30. Á lutaseðli: Gávukort frá Bowlinghøllini.
Tofta Ítróttafelag

BINGO
verður aftur sunnudagin 2. mei og jóansøkusunnudag. Nærri verður lýst seinni.
Vágs Svimjifelag

GOTT PÁSKABINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 29. mars kl. 19. 12 plátur 100 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Drigið verður millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

GOTT BINGO
verður í VB-húsinum mánadagin 29. mars kl. 19.
VB

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu tann 21. mars kl. 16.00. Høvuðsvinningar m. a. gávukort á 1.000,- kr. og fartelefon.
2 hhb á Føroya Handilsskúla

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum 18. mars kl. 19. Full pláta 400,- tó 6. og 12. spæl 600,-. Á lutaseðli m.a. 2 stór páskaregg, gávukort á 500,- og Apex ferðaseðil. Drigið verður millum spølini, eykaspæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Argja Róðrarfelag

BINGO Í HVALBA
Týskvøldið 16. mars klokkan 19.30, verður stórt bingo í Roynhøllini. Høvuðsvinningur: Vikuskiftisferð við Atlantsflog
Royn

Bøkur

8. BIND AV
Árets begivenheder i billeder til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 270427 ella 312981

GAMLAR
føroyskar bøkur til solu.
Tlf. 741669 eftir kl. 19

TIL SØLU
Horisont bøkur 1974-1998 verður selt samlað.
Tlf. 744022/444022

HEY SJÚKRASYSTRALESANDI
Allar bøkurnar til 1. lestrarhálvu bíliga til sølu.
Tlf. 223779

Burturm. /funnið

SVARTUR FRAKKI
Hevur tú av misgáum tikið mín svarta Vero Moda frakka í føstulávintsdansinum í Vági 23. februar os ring til mín, so tú eisini kann fáa tín svarta Pepper Corn frakka, sum hekk eftir.
Tlf. 371714

GULLRINGUR
funnin 13.1.2004 í SMS.
Tlf. 313969

VØTTIR
Føroyskir mynsturbundnir vøttir funnir í bussskýlinum á Hálsi 5. febr. Eigarin kann ringja
Tlf. 315089

Býli

NEYÐARRÓP
Vit eru ein familja uppá 4, sum standa úti á gøtuni 1. apríl. Er tað nakar, sum hevur hús/íbúð til okkara fyri max 6.000 kr. um mán. Vit hava onki stað at fara. Vingarliga ring
Tlf. 503079

ÍBÚÐ/HØLI TIL LEIGU
Lítil íbúð nærindis miðbýnum í Havn til leigu frá 1. apríl. Kann eisini nýtast til skrivstovu
507671

GRUNDØKI Í TRONGISVÁGI
Matr. nr. 144ac, stødd 468 fermetrar til sølu fyri hægstbjóðandi.
Tlf. 371644 ella 220559

HJÁLP
Vit eru eitt ungt par, sum leitar eftir íbúð/húsum í Tórshavnar-umráðnum. Alt hevur áhuga. Vinarliga ring
Tlf. 264369

ÍBÚÐ YNSKIST
Par søkir íbúð í Havnini. Max 5.000 kr. Vinarliga ring á
Tlf. 257969

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Íbúð í Hoyvík til leigu skjótast gjørligt. Hon er 60 feermetrar og nýggj. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1794b

HÚSVILL!!!
Kanst tú hjálpa okkum við at finna eina íbúð/hús 3-4 ver. í KBH./umráðnum, helst í juli /aug-04. Góð leiga kann latast. Vit eru eitt par (fast arb.) við einari 14 ára gamlari dóttir. Alt hevur áhuga.
Ring! 0045-25321323 ella 270634

ÍBÚÐ ELLA KAMAR YNSKIST TIL LEIGU
í Havn.
Tlf 519517 ella 582321

ÍBÚÐ Í KBH. TIL LEIGU Í MAI
Ljós og góð 54 fermetrar stór íbúð við altan og felagshava, til leigu í mai. Kostnaður kr. 1.500,- um vikuna.
Ring +45 25101637

KAMAR TIL LEIGU
frá 01.04. við atgongd til køk, wc/bað og vaskimaskinu. 1.500,- um mør. við el og hita. 1 mør. depositum.
Tlf. 314757 eftir kl. 17

ÍBÚÐ YNSKIST TIL KEYPS
Er tað nakar, ið eigur eina 2-verilsis andeilsíbúð út á Ámager at selja mær. Vinarliga ring
tlf. +45 32886926/+45 27216509 e. kl. 17, Theresa

ÍBÚÐ TIL LEIGU FRÁ 01.04.
kamar, køkur, stova, wc/bað og atgongd til vaskimaskinu. 5.500,- um mør. við el og hita. 2 mør. depositum.
Tlf. 314757 eftir kl. 17

GÓÐ ÍBÚÐ Í HAVN
til leigu beinanvegin, 1 mør. depositum krevst.
Tlf. 217368

ÍBÚÐ YNSKIST
Ung genta, trúgvandi, royki og drekki ikki. Ynski eina íbúð í Havn sum skjótast fyri 2.000 kr. um mør. Gjaldi rættstundis.
Tlf. 264903

UNGT PAR SØKIR ÍBÚÐ
Hús í Havn ella á bygd fyri uml. 3500 kr. um mánaðin. Eru friðarlig, fara væl um og gjalda itl tíðina.
Tlf. 506600

HÚS TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, verða eini hús í Hvalvík seld.
Tlf. 224979

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Er onkur sum kann leiga okkum eina íbúð í viku 16 (frá uml. 10.-17. apríl) Má hava 2 soviplass. Roykja og drekka ikki. Prísuppskot uml. 1000 kr.
Tlf. 313372 ella E-post:olselsba@hotmail.com

SUÐUROY
Hús í Lióini og Hús í miðbýnum á Tvøroyri til leigu styttri tíð og víkuskifti. Vanligir hentleikar eru.
Tlf. 222684

GARAGA YNSKIST TIL LEIGU
Garaga ynskist til leigu í Havn.
Tlf. 225345

HÚS YNSKJAST
Hús ynskjast til leigu í høvuðsstaðarøkinum frá 15. juni.
Tlf. 212004

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Einstaklinga-íbúð til leigu, 50 fermetrar, stova/køkur í einum og eitt kamar, fyri 4.400 kr. um mán. við hita, uttan el, 1 mán. dep.
Tlf. 313339 um kvøldið

HÚS TIL SØLU

Mál nr. 302
Adr.: Norðuri í Sundunum, 410 Kollafjørður
Stødd á sethúsum: 66 m² x 3
Stødd á grundøki: 300 m²
Byggiár: Uml. 1907 (bygt uppí 1985)
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 304 (Tvíhús í gerð)
Adr.: Ravnsoyargøta, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 93 m² x 2
Stødd á grundøki: Uml. 339 m²
Byggiár: 2004
Kostnaður: Kr. 1.450.000,-

Mál nr. 306
Adr.: Bókbindaragøta 13, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 74,46 m² x 3
Stødd á grundøki: 408 m²
Byggiár: 1956
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 307
Adr.: Undir Gráasteini 45, 100 Tórshavn
Stødd á tvíhúsum: 55 m² x 2
Stødd á grundøki: 266 m²
Byggiár: 2002
Kostnaður: 1.400.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 309
Adr.: Á Tanganum, 800 Tvøroyri
Stødd á sethúsum: 53 m² + loft og kjallara
Stødd á grundøki: 298 m²
Byggiár: 1940
Kostnaður: Kr. 650.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 310
Adr.: J. Nolsøesgøta 14, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 79,6 m² x 2
Stødd á grundøki: 360 m²
Byggiár: 1950
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 311
Adr.: Breiðablik, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 130 m² x 2 + kjallara
Stødd á grundøki: 500 m²
Byggiár: 2003/2004
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 313
Adr.: Undir Krákugjógv 13, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 38 m² x 2 í tveimum hæddum + kjallara
Stødd á grundøki: Uml. 424 m²
Byggiár: 1945
Kostnaður: Kr. 1.100.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 314
Adr.: Á Teigi 5, 100 Tórshavn
Stødd á tvíhúsum: 72 m² umframt loft og kjallara. Eisini er bilhús við grøv og hjalli
Stødd á grundøki: 300 m²
Byggiár: 1988
Kostnaður: Kr. 1.500.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 315
Adr.: 416 Signabøur
Stødd á neysti: 31,2 m² x 2
Stødd á grundøki: Uml. 100 m²
Byggiár: Økent
Kostnaður: Kr. 125.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 316
Adr.: Guttormsgøta 9, 188 Hoyvík
Stødd á sethúsum: 126 m²
Stødd á grundøki: 518 m²
Byggiár: 1999
Kostnaður: Kr. 1.500.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 317
Adr.: Haraldstrød 11, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 110 m² x 2 + loft og hjall
Stødd á grundøki: 515 m²
Byggiár: 1973
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 318
Adr.: Lambagerði 1, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 160 m² x 2 + garagu
Stødd á grundøki: 504 m²
Byggiár: 1982
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

GRUNDØKI/JØRÐ

Mál nr. 109
Adr.: 440 Haldórsvík
Vídd á jørð: 2 gyllin + innangarðs
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 558
Matr.nr. 226 d
Adr.: 380 Sørvágur
Vídd á grundøki: 785 m²
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 567
Adr.: Hákunargøta, 188 Hoyvík
Vídd á grundøki: 609 m²
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 568
Adr.: Øravíkarlíð, 826 Trongisvágur
Vídd á grundøki: 608 m²
Kostnaður: 60.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 569
Adr.: við Stoffalágvegin, 100 Tórshavn
Vídd á grundøki: 500 m²
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Vit hava eisini onnur sethús, sum ikki eru lýst í blaðnum. Støkk inn á gólvið.

Húsamekling
Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16

KAMAR YNSKIST TIL LEIGU Í HAVN
Ung genta ynskir kamar til leigu. Royki ikki, drekki ikki, gjaldi rættstundis. Havi fast arbeiði.
Tlf. 361586

ER TAÐ NAKAR
Sum hevur eina 1-2 ver. andelsíbúð til sølu í KBH ella KBH-umráðnum.
Tlf. 0045 60191417 ella 218398

HÚS TIL SØLU
Um hóskandi bið fæst, eru eini eldri hús í Vestmanna til solu. Liggja væl fyri.
Tlf. 424289 ella 220915

Dýr

TIL SØLU
1 fuglabúr 42x25x42 cm til sølu. Ymiskt tilhoyr fylgir við.
Tlf. 318820 ella 283820

SERA FITTUR BORDER COLLIE HVØLPUR
Verður latin djóravini, vegna serliga umstøður.
Tlf. 314394 ella 228337

HUNDAHVØLPAR
Vit hava 3 hvølpar. Mamman er puddil (blandað) og lítil á vøkstri. Kunnu heintast viku 18-19. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 421420/516004

YNSKIST TIL KEYPS
Akvariufiskar ynskjast til keyps.
Tlf. 210867

HUNDAHVØLPAR
3 sera fittir hundahvølpar kunnu latast um eina viku, men bert til djóravinir. Teir eru brúnir á liti og verða ikki stórir.
Tlf. 315714 eftir kl. 17.00

HAMSTRARAUNGAR
Eg havi fingið fleiri ordiliga fittar ungar og teir eru klárir nú, og eru til sølu fyri 40 kr. stk.
Tlf. 258613 Anita

EKTAÐUR GOLDEN RETRIEVER
hvølpur (hundur) til sølu. Ættartalva verður latin við.
Ring 311264 ella 226702

HVAR ER SPEEDY???
Hevur nakar sæð kettuna hjá mær? Hon er svort, hvít og reyð og bleiv burtur mánadagin 1. mars í Kaldbak. Vinarliga ring
251303/222955, Bárður

MINI COLLIE
hvølpur kann heintast av djóravini.
Tlf. 255431/421227

HEY!
Eg eri ein 14 ára gomul genta, sum fegin vil passa ein stillan og róligan hest og eg búgvi í Leirvík, so tað skal ikki vera so langt vekk frá Leirvík.
Tlf. 443328

TVEIR SERA FITTIR
hundahvølpar, lagdir 20. februar undan spakari Border collie av seyðahundaslag. Lunnu latast 10. apríl, bert til djóravin.
Tlf. 448990 eftir kl. 18

MARSVÍN TIL SØLU
Marsvín (hon) og búr við tilhoyri til sølu fyri 450 kr. Nýprísur 800 kr.
Tlf. 421116

ER TAÐ NAKAR
sum vil lata mær eitt ross at passa í 4 mør. Rossið skal helst vera spakt, so um tú ert áhugaður, so ring á
tlf. 441990 ella 262081

PUDDILHUNDUR
Ektaður puddilhundur til sølu.
Tlf. 582040

GÓÐ SEYÐAKLIPS
Góð seyðaklips við ella uttan áskrift bíliga til sølu.
Ring 215230 ella E-mail: Merkir@hotmail.com

VEGNA GÁSABØGU OKKARA
sum bleiv yvirkoyrd, lýsa vit eftir einari aðrari bøgu til steggjan.
Tlf. 220557

LABRADORHVØLPAR
Við stamtalvu til sølu. Kunnu latast um eina viku.
Tlf. 445012

HEY ALLIR DJÓRAVINIR
Eg eri ein hvít ketta, sum fegin vil lata mínar kettlingar. Eg eigi tveir hvítar/reyðbrúnar og ein svartan/-hvítan. Teir kunnu latast í viku 19. Teir duga at klára seg sjálvan.
Tlf. 424499 best eftir kl. 17

Fundir

AÐALFUNDUR
verður í felagnum Tónungdómur 25. mars kl. 19.00.
Tórshavnar Musikskúli á Frúutrað 1

AÐALFUNDUR HJÁ KRIS Í FØROYUM
Aðalfundurin hjá Kris í Føroyum verður leygardagin 27. mars kl. 14.00 í Hæddini í Runavík. Skrá sambæt lógum felagsins.
Nevndin v/ Gvøðbjørg West, form.

ALMENNUR FUNDUR
Týskvøldið 16. mars verður almennur fundur í Norðskála/Oyra skúla kl. 19.30.
Við pallborðið sita:
ein við Down Syndrom, avvarðandi, politikkari, lækni, umboð í siðsemisnevnd.
Eisini verður sangur og drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Javni

FOSTURKANNINGAR – HVAT VILJA VIT?
Almennu okisfundirnir hjá Javna, við heitinum »Fosturkanningar - hvat vilja vit?« verða kring landið í hesari vikuni.
Týskvøldið á Norðskála/Oyra skúla kl. 19.30.
Mikukvøldið á Klaksvíkar Sjómansheimi kl. 19.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Javni

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
Fundur verður í Losjuni, Tinghúsvegur 18, 17. mars kl. 19.00. Irena Jacobsen sýnir fram Aloe Vera vørur. Ymiskt.
Pensionistafelagið í Havn

HALDÓRSVÍKAR SÓKN
arbeiðarafelag hevur ársaðalfund hósdagin 18. mars 04 kl. 19.00 í kantinuni á flakavirkinum.
Nevndin

AÐALFUNDURIN HJÁ ARGJA RÓÐRARFELAG
Aðafundur verður leygardagin 3. apríl kl.14.00. Skrá sambæt lógum felagsins.
Argja Róðrarfelag

NORRØNA FELAGIÐ Í FØROYUM
Ársaðalfundurin 2004 verður í Jákupsstovu mikudagin 31. mars kl. 20.00. Skrá sambæt lógini. Mál til viðgerðar á fundinum skulu vera inni 8 dagar fyri fundin.
Nevndin

ÆTTLEIÐINGARFELAG
Familjur við ættleiddum børnum, ætleidd ella tey, ið ætla at ættleiða – vælkomin til hugnadag og stovnan av føroyskum felag fyri ættleiðing í leguhúsinum í Nesvík leygardagin 3. apríl 2004 kl. 9 (morgundrekka). Tekningarfreist 21. mars. Vaksin 200 kr., børn ókeypis. Tilmelding:
Annika tlf. 310649 ella Nita tlf. 312705

FRÁ FØROYA HEIMAVIRKISFELAG
Ársaðalfundur verður í Tilhaldinum, Tórsgøta 21, í Tórshavn leygardagin 20. mars kl. 14.00. Skrá samb. viðtøkum felagsins. (sjá www.craft.fo).
Nevndin

AÐALFUNDUR FRÁ FRODBIAR SÓKNAR RÓÐRARFELAG
Aðalfundur felagsins verður sunnudagin 21. mars kl. 16 í Neystinum. Skrá sambæt lógum felagsins.
Nevndin

2. EYKAAÐALFUNDUR
2. eykaalfundurin hjá Bygdarfelagnum Varðanum, verður í bygdarhúsinum mikudagin tann 17.03.04 kl. 20.00 við hesi dagsskrá:
1. Val av nevndarlimum, tiltakslimun og grannskoðarum. Allir limir eiga at møta. Nýggir limir kunnu tekna seg.
Nevndin

Húsarhaldstól

KØLISKÁP TL SØLU
Er í góðum standi, 3 ár, av merkinum »Atlas« hvitt 105 h x 55 b x 60 d. Tll sølu fyri 1800 kr.
Tlf. 443265